# BØNARLØTAN

**Juni, Juli, August 2017 32. árg.**

***1. Dagur Sálmur 81 og 82, 1. Sám. 11.1-15, Gal. 2.1-21***





*Kurdiska samkomuhúsið – einasta loyvda nýggja samkomuhús í muslimska heiminum.*



*Craig við fyrstu kurdisku Bíbliuni.*

*Craig til máltíð í Erbil við kurdiskum kristnum.*

## ONGLAND, Birmingham, OM
## Claire og Craig Niclasen
## Elizabeth 11, Rebekah 9, Lydia 7

4 av 5 gerast kristin í Kurdistan við at lesa Bíbliuna. Við nýggjari app kunnu enn fleiri lesa Orð Guds á kurdiskum. Í sept. fara vit undir Missions Discipleship Training Program og English Language and Cultural Opportunities. Biðið, at fleiri søkja um upptøku á hesi skeið.

## KRINGVARPIÐ

11. juni Sjónvarpsandakt, Óluva Skaale.
6. aug. Útvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík.

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møtir í Jútlandi

3. juni kl. 19 í Aalborg, Bethaniakirkjan, Dag Hammarskjøldsgade 2A.

## ZAREPTA

Familjulegur 15. mai - 23. juni; summarlegur 25. juni - 13. aug.; 18 ár og eldri 18. - 20. aug.; famuljulega fyri foreldur við børnum, ið bera brek 24. - 28. aug.; bíbliuskeið 28. aug. til 3. sept.

## GRØNLAND

### Anna og Óli Steinberg, Juvel II

1. juni verður farið til Grønlands á 10. ári. Fólk manglar til at spæla harmoniku ella klaver frá 8. juni til 18. juli. og maskinmeistari manglar til heimferðina frá Narsarsuaq 8. sept. Tel. 275218.

★ 1. juli fyllir Miriam Joy Berghamar 14 ár.
★ 1. aug. fyllir Andreas Nónstein 8 ár.

## ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn

### Rósa og Jógvan Purkhús

### Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn

29. mai fóru 18 mans til Ástjørn at gera gamla køkin um til seturstovu til starvsfólkið. Legurnar eru 20. juni til 20. aug. Brúk er fyri hjalparfólki til allar fýra legurnar.



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
Bara millum 5 og 10 fólk hava teknað seg at hjálpa til á ymsu legunum. Um 15-17 fólk komu, hevði verið møguligt at havt 7 børn á hvørjum liði. Tørvur er á leiðarum og vaski- og køksfólki, eisini at ansa børnum hjá hjálparfólkum. Upplýsing hjá Victoriu og Karstin Neshamar tlf. 272376 og 259481. Biðið, at loyvda talið á ferðafólki uppá 33 við Immanuel ikki verður sett niður, sum myndugleikarnir umhugsa.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**



**FØROYAR**
**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
Nú fara vit undir at gera vatnmyllu í Zarepta, og tí er tørvur á fólki at arbeiða í haganum í summar. Eftir summarið byrjar arbeiðið uppá nýggja svimjihylin í Niðarulon. Bíbliuskeiðið verður 28. aug. til 3.sept. Tilmelding frá 15. juli hjá Giddu Vang tlf. 265390. Biðið eisini fyri legunum og leiðsluni. Arnvør livir rímiliga væl, men stríðist við vaml. Hon skal í skannara aftur 2. juni.



**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Jenny 9, Svend 8, Terji 5, Petra 3**

## *3. Dagur* *Orðt. 11.1-15, 1. Sám. 12.1-25, Sálmur 92*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
1. - 8. juni eru vit í Papua, Indonesia, at tala á árligu trúboðastevnuni, 10. juni - 26. juli eru vit í Teilandi, tí leiðslan er burturstødd alt summarið. 27. juli til 16. aug. eru vit í Filipsoyggjum at hjálpa leiðsluni umframt hvørja viku at hava tveir bíbliuflokkar.

## *4. Dagur* *Tit. 1.1-16, Ápost. 15.1-21, Gal. 3.1-29*



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 9, Andreas 7, Kristina 6**
Í summar eru 10 ár eru liðin, síðan vit komu upp í arbeiðið í Kristnastovu. Vit hava nú gjørt av at fara í farloyvi í Føroyum í eitt skúlaár. Ímeðan røkja ymisk hjún arbeiðið. Tey fyrstu at flyta inn eru Lisa og Trygvi í Liða og dóttirin Nomi.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 13, Rebekka 12, Hanna 9**
IS ger nógv um seg, og forsetin hevur lýst undantaksstøðu í sunnara partinum. Nógv hava latið lív. Fyribils sleppa okkara trúboðar ikki at virka har. Eisini trúboðarnir í Suðurpalawan hava fingið boð at rýma fyribils. Vit verða í Føroyum í juni, juli og aug.

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 14**

## 5. Dagur *Orðt. 11.16-31, 1. Sám. 13.1-23, 1. Mós. 31.36-55*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 12, Victoria, 10, Emma Grace 9, Jónatan 7, Markus 5, Evita Linda 2, Joy Hanna 0**

11. - 17. juni eru vit í Zamora í Michoacán at evangelisera saman við bólkum úr øðrum samkomum. Endamálið er at geva øllum 45.000 heimunum traktat og Jóhannesar evangeliið. Útimøtir verða hvørt kvøld. Vit fara aftur til Mexico 6. juni. Vit eru glað fyri tíðina í Føroym.



**FILIPOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Fleiri ætla nú at brúka bíbliutímarnar á kankanaey-málinum at læra familjuna heima ella at náa grannar við evangeliinum. Skjótt fara vit at prenta Kankanaey-bíbliuna aftur; hon hevur verið útseld síðan 2008. Vit vitja familju í summar í Onglandi og Kanada og koma eisini ein túr til Føroya fyrst í juni.

★ 5. aug. fyllir Caleb Hansen 15 ár og Karis Flanagan 4 ár.

## 6. Dagur *Tit. 2.1-15, Sálmur 89.1-24, Gal. 4.1-11*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Vit eru í Føroyum 9. juli til 6. aug. Maria og Jens Bech avloysa okkum. Í summar eru møtir sunnudag kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangeliskt møti, mikudag kl. 20 bønar- og uppbyggingarmøtir. Malta er altíð opið til ein drekkamunn og eitt gott prát, eisini fyri ferðandi gestir. Tel. +45 98944370.

★ 6. juni fyllir Emma Guttesen 1 ár.

## *7. Dagur* *Tit. 3.1-15, Ápost. 15.22-41, 1. Mós. 32.1-12*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Regntíð er nú, tá vit vanliga ikki undirvísa; men í ár møtast vit eina ferð um vikuna við teimum, sum hava hug at lesa og biðja saman. Ein ungur trúgvandi spurdi, nær vit fóru at syngja. Tey syngja heilt øðrvísi enn vit. Vit vóna, at onkur skjótt fer at yrkja sangir at syngja saman. Í juni rætti eg 1. Korintbræv við málhjálparum og skal á skeið í Dakar. Eg komi heim nakrar vikur í summar at vitja mammu.

⋆ 7. juni fyllir Boas Jacobsen 10 ár.

## *8. Dagur* *Sálmur 83, 1. Sám. 14.1-23, Gal. 4.12-31*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 9**

Í summar tosi eg á familjulegunum um evnið familjulív. Skjótt verður stór føroysk heimasíða um trúarverju á netinum. Vit gera tilfar og royna at finna persónar, sum kunnu skriva greinar. Vit vóna, at serfrøðingur kann vegleiða soleiðis, at sjúkan hjá Adoniu kann basast við kosti og vitaminum.

**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**

Jens heldur á í tænasuni á familjulegum og summarlegum í Zarepta gjøgnum summarið. Vit loysa eisini Hans og Annu Djurhuus av. Okkum tørvar vísdóm til hetta stóra verk Harrans.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 9**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**

## *9. Dagur 3. Mós. 7.20-38, Ápost. 16.1-21, 1. 1. Mós. 32.13-32*

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Jens Allan 16, Ryan 8**

Vit verða í Føroyum 10. juni til 24. juli og so aftur 11. - 16. aug. Okkum tørvar íblástur, hvíld og onkran at ansa Ryan í 3 vikur í Dakar. 24. juli fara vit til USA í brúdleyp hjá elsta syni okkara Andrew og Rachel Swanson. 28. aug. til 16. sept. gera vit frálærutilfar liðugt, sum fevnit um at læra at lesa og skriva susu málið. Tveir mans hiðani ferðast til Dakar at hjálpa okkum. Biðið, at teir koma fram til tíðina. Annars fáa vit onki gjørt.

⋆ 9. juni fyllir Jenny í Prestgarði 10 ár.

## *10. Dagur Ápost. 10.24-48, 1. Sám. 14.24-52, Sálm. 93 og 94*

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 14**

Ráðstevnan „Ger mun!“ verður 16. - 18. juni. Væntandi koma um 200 fólk. Næmingatalið komandi skúlaár kundi verið hægri. Fleiri vísa áhuga at taka 2. árið, og fýra hava avgjørt at taka 3. árið. Biðið, at fleiri søkja inn á 1. árið.

## *11. Dagur 3. Mós. 8.1-17, Ápost. 16.22-40, Gal. 5.1-26*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg fari aftur til Meksiko 22. juni. Biðið fyri Sue, mær og toyminum, nú vit umseta og royna at geva nakrar bøkur út. Nú fái eg eisini nýggja fyrisitingarliga ábyrgd.

## *12. Dagur* *Ápost. 11.1-30, 1. Sám. 15.1-19, 1. Mós. 33.1-20*



### DANMARK, Brejning
### Jan og Anne Zachariassen

Eg fari til Noregs á altjóða deyva-missiónsstevnu í eina viku. Fleiri luttakarar úr ymiskum londum siga frá arbeiðnum ímillum deyv og greiða frá, hvussu deyv smábørn og vaksin kunnu læra at klára seg í lívi og trúgv.

### DANMARK
### Glostrup Frikirke

Møtini sunnudag halda fram alt summarið; breyðbróting kl. 10, sunnudagsskúli kl. 10, familjumøti kl. 11.

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi
### Carol og Poul Joensen, Jonathan Daniel 17, Ísak 14

## *13. Dagur* *3. Mós. 8.18-36, Sálmur 89.25-53, Gal. 6.1-18*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Ein mannligur leiðari manglar til 3. leguna og ein tónleikari til 3. og 4. leguna. 7 dúgligir menn hava arbeitt upp á Juvel í mai og inni á legunum. 8 fólk koma í juni at gera elverkið liðugt og vónandi at stoypa grundina til nýggja starvsfólkahúsið. Vit vóna at reisa og inniloka í aug. Vit høvdu legusamkomu 20. mai. 40 fólk komu. Tørvur er á yngri kreftum at vera í styttri ella longri tíð, nú Marjun og Páll av heilsu og aldri ikki orka tað sama sum fyrr.

★ 13. aug. fyllir Isabel Tuohy 13 ár.

## *14. Dagur* *Ápost. 12.1-11, Luk. 7.24-50, 1. Mós. 34.1-31*

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

Gleðiligt, at jøvn tilgongd hevur verið inn á skúlan. Fyrsta árið fáa 30-50 ymsastaðni úr Evropa miðvísa bíbliulæru. Av hesum fara 15-20 á missiónsárið, tvs. fyrireiking til trúboðaravirki. Julie og eg gleða okkum til komandi árið, tí tá koma yngri sonur okkara við konu og barni á skúlan.

## *15. Dagur* *Sálmur 84 og 85, Ez. 1.1-21, 2. Kor. 1.1-24*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

John var glaður fyri ferðina til Kasakstan, har hann undirvísti og hjálpti trúboðum, pastorum og øðrum. 26. - 30. juni verður árligi summarbíbliuskúlin „Vacation Bible School“ fyri børn. Ommu- og abbasynir okkara, Alex, 9 ár, og Ian, 6 ár, verða við.

⋆ 15. juni fylla Micah og Rueben Magura 4 ár.
⋆ 15. aug. fyllir Victoria Tuohy 11 ár.

## *16. Dagur* *3. Mós. 9.1-24, Luk. 8.1-18, 3. Mós. 11. 24-47*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Nakkapínan hjá Annu er horvin; hon hevur tikið uppá og hevur tað betri. Charlton er glaður fyri gott starv. Dubby ger videoklipp við læru saman við unga manninum Andrew. Støða skal takast til, um Anna skal skurðviðgerðast í heilanum. Dubby ætlar at fara til Senegal 18. aug. - 5. sept.

## *17. Dagur* *Ápost. 12.12-25, Ez. 1.22-2.10, Sálmur 95 og 96*



**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

Gleðiboðskapurin er á fyrsta sinni kunngjørdur Iski-fólkinum í Papua Ný Guinea, og fleiri hava játtað trúgv. Í juni fara vit til Onglands á fund við NTM-leiðsluna og á NTM-ráðstevnu.



**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Lis og Zacharias Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**

## *18. Dagur* *3. Mós. 10.1-20, Luk. 8.19-39, 2. Kor. 2.1-17*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 14, Megan 12,**
**Trisha 5, Emma 0**

Vit vóna at koma heim at vitja í summar, men enn hava Megan og Trisha ikki fingið neyðugu skjølini. 3. - 11. juli skipa vit á sætta sinni fyri Parola.



**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 4 , Micah 4**

Vit verða í Føroyum í juli.

★ 18. aug. fyllir James Ellingsgaard 11 ár.

## *19. Dagur* *Ápost. 13.1-25, Ez. 3.1-27, 3. Mós. 12.1-18*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Stóra evangeliska tiltakið 23. apríl uttan fyri Istanbul gav úrslit. Færri fólk, men góðar samtalur og forbøn fyri mongum. Vit verða í Føroyum ein mánað frá síðst í juni og vóna at síggja mong.

**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

## *20. Dagur* *3. Mós. 11.1-23, Sálmur 90, 2. Kor. 3.1-18*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**

Í juni fara vit til Týsklands, tí Natalie skal eiga í aug. Ímeðan tekur ein samstarvsfelagi sær av bíbliuundirvísingini. Vit mugu finna onkran afturat honum, tí tveir flokkar verða undirvístir samstundis.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 5**

Tað var so gott endiliga at vitja aftur í Føroyum. Í mai var vápnað rán heima hjá týskari familju í NTM, sum býr í Brasilia. Vit hava syrgt fyri, at tey fáa hjálp.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 9, Noah 7, Karis 3, Judah 2**

## *21. Dagur* *Ápost. 13.26-52, Luk. 8.40-56, 3. Mós. 13.1-23*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 7, Nana 5, Louie 3**
Vit eru byrjað at arbeiða í samkomuni í Moridai. Samkoman hevur kafé. Okkum tørvar vísdóm at vita, hvussu vit best kunnu náa tey, sum búgva í økinum.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 6, Leah Eve 3**
⋆ 21. aug. fyllir Eva Berghamar 17 ár.

## *22. Dagur* *Sálmur 86 og 87, Ez. 4.1-17, 2. Kor. 4.1-18*

**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty, Sonja 17, Timothy 17, Karina 15**
Vit verða í Írlandi í summar. Sonja verður liðug í skúlanum nú og flytir tí til Írlands at lesa. Guðrun, Timothy og Karina fáa visa gjøgnum skúlan og fara aftur til Moskva 20. aug. Ivor verður í Írlandi til síðst í sept.

## *23. Dagur* *Róm. 16.1-16, Luk. 9.1-22, 3. Mós. 13.24-44*

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 13, James 10, Micha David 7**
Ein maður úr Iran, búsitandi í Týsklandi, kom til trúgv við at lesa bókina Lambið. 200.000 eintøk av evangeliskari bók hjá GoodSeed vórðu prentað á chichewa málinum og latnar trúboðarafelagskapi at geva í Malawi í Eysturafrika. Hetta er fyrsta og einasta kristna bók, tey hava í heimum sínum.

## *24. Dagur* *Es. 32.1-20, Ez. 5.1-17, Sálmur 97 og 98*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 13, Micah 10, Ezra 8,**
**Uhenya 6, Boas 3**

Biðið fyri teimum, sum koma til undirvísing hvønn leygardag, og um varðveitslu, sum vit ferðast til ymisk støð at undirvísa hvønn leygardag.

## *25. Dagur* *Róm. 16.17-22, Luk. 9.23-42, 2. Kor. 5.1-21*

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Eva 16, Miriam Joy 13, Noah 11, Lydia Sigrid 0**

1. aug. leggur Andrew frá sær sum leiðari av OM-DK eftir 10 ár í hesi tænastu. „Vit takka øllum, sum hava stuðlað okkum!“. Andrew heldur fram í tænastuni í Skovlunde Frikirke umframt at hjálpa til við undirvísing og umsorgan í øðrum samkomum, serliga í Kristnastovu.

**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

## *26. Dagur* *Es. 33.1-24, Ez. 6.1-14, 3. Mós. 13. 45-59*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit vera við til Parola her í juli. Vit vitja Filipsoyggjarnar í juli-aug. og verða síðan nakað saman við synunum og verdøtrunum í USA.

## 27. Dagur *Ef. 5.17-33, Sálmur 91, 2. Kor. 6.1-7.1*



**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhs. Frants Poulsen**

Nógv fólk ganga kravgongur. Um okkara leiðir er enn friðarligt. Í aug. hava vit árligu trúboðarastevnuna á bíbliuskúlanum, nú hann verður 20 ár. Biðið, at samkomuleiðarar og fólk við áhuga koma. Í aug. vitja vit samkomuna og familjuna hjá Nurimar.

⋆ 27. juli fyllir Noah Guttesen 15 ár.

## 28. Dagur *Es. 34. 1-17, Luk. 9.43-62, 3. Mós. 14.1-32*



**TEILAND**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 15, Jonathan 15, Leslie 15, Emily 7, Bethany 2**

Vit fara at undirvísa 3. og 4. flokki í enskum. Neyðugt er eisini at læra teilendska málið, læra tónan, lurta og tosa. Vit mugu finna annan bústað at leiga innan tveir mánaðir.

(v) = í venjing (f) = í farloyvi (fj.a) = fjararbeiðandi

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Jónvør Christiansen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## 29. Dagur — Sálmur 88, 1. Mós. 30.25-43, 2. Kor. 7.2-16



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 12, Aron 5, Noah Kristian**
Ætlandi fara vit aftur til Teilands 2. aug. Sera torført er at fáa uppihaldsloyvi.
★ 29. juni fyllir Justin Jacobsen 16 ár.

## 30. Dagur — Ef. 6.1-24, Gal. 1.1-24, 3. Mós. 33-57

**OM FØROYAR**
**Anita og Oddmar Tausen**
Nógvir føroyingar fara á Outreach til Moldova, Albania, Portugal, Frakland og Spania í summar og á TeenStreet í Týsklandi. Logos Hope er í Karibiska Havinum. OM-Danmark, OM-Noreg, og OM- Svøríki skulu hava nýggjar leiðarar.



**FILIPSOYGGJAR, Manila (f)**
**Anja Nielsen**
Gott at vera á bíbliuskúla í Eysturríki. Stóra takk fyri tíðina heima og fyri gávur.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**Himmellys**
**– genskær af**
**Guds kærlighed**
**199 kr.**




Hvønn dag verða vit mint á kærleika Guds. Hann tekur sær av okkum í øllum lívsins umstøðum. Onki er ov týdningarleyst fyri hann. Hann kennir okkum. Joni hevur í meir enn 50 ár verið lamin og sitið í koyristóli. Bókin lýsir álit hennara á Gudi, og hvussu vit kunnu endurspegla kærleika Guds.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo